

## Vilja hava neyðug stig

Ein meiriluti av heimsins íbúgvum vilja hava teir politisku leiðararnar at taka neyðug stig á veðurlagsráðstevnuni, sum byrjar í Keypmannahavn í dag. Í einari meiningakanning, sum BBC hevur skipað fyri, siga 64 prosent av teimum spurdu, at í teirra eygum eru veðurlagsbroytingarnar ein álvarssamur trupulleiki. Í einari tilsvarandi kanning í 1998 høvdu 44 prosent ta áskoðanina. Í nýggju kanningini siga 61 prosent, at tey taka undir við tiltøkum at avmarka veðurlagsbroytingarnar, hóast tað kann fáa avleiðingar fyri landsins búskap. BBC spurdi 24.000 fólk í 23 londum.

# Hvør kemur at manna FF

**Klokkan 16 seinasta fríggjadag var greitt, at Jan Højgaard, felagsformaður, noyðist út í valstríð, nú Hendrik Old hevur gjørt av at taka upp dystin um felagsformanssessin í FF**

VAL Í FF

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Val er í Føroya Fiskimannafelag á hvørjum ári, men felagsformansval er bara triðja hvørt ár. Tað merkir, at felagsformaðurin verður valdur fyri eitt tríáraskeið.

Fiskimannafelagið er skipað við sóknarformonnum, sýsluformonnum og so felagsformanni, og soleiðis er val á hvørjum ári.

Fyri trimum árum síðan varð Jan Højgaard valdur til felagsformann í kapping við tásitandi formann, Óla Jacobsen og Dan Reinert Petersen, sum eisini læt seg stilla upp.

Jan fekk flestar atkvøður av hesum trimum.

Í ár er felagsformansval, og seinasta fríggjadag klokkan 16, tá freistin at stilla upp var úti, gjørdist greitt, at Hendrik Old, fyrrverandi løgtingsmaður, hevur gjørt av at bjóða seg fram sum umboð fyri fiskimenn tey næstu trý árini.

Soleiðis skulu fiskimenn, sum eru limir í Føroya Fiskimannafelag, nú at velja ímillum sitandi formann og avbjóðaran.

Fyri at stilla upp, skal valevni hava fimm sóknir ella fimm skipsmanningar aftanfyri seg. Sambært valskipanini kunnu eisini sóknir og manningar saman stilla mann upp til valið.

Hendrik Old er gamal skipari og eisini í tíðini, hann sat á tingi, plagdi hann javnan at loysa av um sumrarnar, eitt nú umborð á svenskum fiskiskipum.




*Fiskimenn skulu nú gera av, hvør skal manna skrivstovuna á Bryggjubakka næstu trý árini*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# Jan Højgaard fúsur til dyst um f



*- Longu áðrenn eg varð valdur til felagsformann í Fiskimannafelagnum, segði eg, at tað helst fór at taka meiri enn trý ár at fáa alt upp á koyra í felagnum, sum Jan Højgaard tekur til*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

**- Eg trúgvi neyvan, at aktivir fiskimenn fara at velja ein fyrrverandi reiðara til formann í Fiskimannafelagnum. Tað eru reiðarar, sum ynskja meg burtur, tí við mær sum formanni verður truplari at hjá teimum at manna skipini við bíligari arbeiðsmegi, sigur Jan Højgaard**

VAL Í FF

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Sitandi formaður í Fiskimannafelagnum hevur sínar tankar um, hvussu Hendrik Old, fyrrverandi løgtingsmaður, er vorðin valevni til felagsformansvalið.

- Tað eru sóknarformenn, sum hava ringt til mín og hava fortalt mær, hvussu hetta hevur gingið fyri seg. Eg kenni tí søguna aftanfyri alt hetta, sum er hent seinastu dagarnar, áðrenn freistin at stilla upp gekk út.

Men Jan Højgaard er fúsur at taka dystin upp við fyrrverandi løgtingsmannin.

### Góðar vónir

- Ja, eg havi góðar vónir. Tað verður ilt hjá mær at trúgva, at aktivir fiskimenn fara at velja ein fyrrverandi reiðara til at umboða seg í felagnum. Hetta fer avgjørt at gera, at fiskimenn fáa eitt stirvið felag.

Sitandi formaður sigur, at tað eru reiðarar, sum gjarna vildu havt hann burtur, tí teir meta hann at vera eina forðing fyri at manna skipini við bíligari arbeiðsmegi.

- Vit hava áður merkt, at reiðarar hava lagt trýst á okkum fyri at fáa bíligari arbeiðsmegi umborð, og faktað er, at onkur rækjuskip hava blakað føroyingar í land.

Formaðurin í Fiskimannafelagnum hevur annars ikki hug at peika á skip ella skipabólkar í hesum sambandi.

- Men hetta er ein trupulleiki, har neyðugt er at vera á varðhaldi, leggur hann aftrat.

### Betri eftirløn

Jan Højgaard sigur, at longu áðrenn hann varð valdur til felagsformann í Fiskimannafelagnum fyri trimum árum síðan, segði hann, at tað helst fór at taka meiri enn trý ár at fáa alt upp á koyra í Fiskimannafelagnum, sum hann tekur til.

- Eg byrjaði næstan á berum og fekk lítla hjálp. Noyðist eg at gevast sum formaður nú, er meginparturin av tí, eg havi verið við til at lagt lunnar undir hesi árini, burturspilt.

Sitandi formaður sigur, at eitt av teimum málum, sum liggur millum tey fremstu hjá felagnum, er at tryggja fiskimonnum eina betri eftirløn.

- Fiskimenn rinda í dag 35 krónur fyri hvønn mynstringardag til eftirløn. Saman við tí, sum reiðararnir gjalda, er talan samanlagt fyri allar veiðibólkar um eina eftirløn, sum svarar